TVØROYRAR KOMMUNA

# Lærari til lektiucafé í Tvøroyrar Kommunu

Sosiala deild á Tvøroyri søkir í samstarvi við Tvøroyrar skúla eftir einum lærara 15 t./vikuna. Lærarin kemur at arbeiða í eini lektiucafé, sum skal stuðla børnum, ið hava brúk fyri eyka hjálp til skúlaarbeiði í ymiskum fakum. Fyribils er starvið fyri skúlaárið 2006/2007, og vit vænta at tú kanst byrja í starvinum, umleið 14. august 2006.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv við fjølbroyttum avbjóðingum og rúm fyri nýhugsan og møguleika fyri persónligari og fakligari menning.

Søkt verður eftir einum viskisfúsum lærara, sum kann arbeiða sjálvstøðugt og kann taka ábyrgd, sum hevur hugflog og er kreativ/ur og sum dámar væl at arbeiða við børnum.

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Leiðaran á sosialu deild, Susanne Madsen á tlf. 229085.

Umsókn saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera sosialu deild á Tvøroyri í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. juli 2006.

**Tvøroyrar Kommuna**
Sosiala Deild
Postboks 80
FO-800 Tvøroyri

**Mrk. »Lektiucafé«.**

**Skála skúli**
Skálavegur 194 · FO-480 Skála
Tlf. 441368 · Fax 441360
Skúlaleiðarin tlf.: 442118 · fartlf. 586005
E-mail: skalask@post.olivant.fo · www.skulin.fo/ska/index.htm

# Fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

verður søkt eftir lærara frá skúlaársbyrjan og til umleið 1/2 februar 2007.

**Viðkomandi kemur at undirvísa**

| | |
|---|---|
| 1.-2. flokki | heimstaðarlæru, tilevning og tónleiki |
| 5.-6. flokki | donskum |
| 3.,4.5. flokki | handverk og list (tónleik, heimkunnleiki, handarbeiði) |
| 6.-7. flokki | heimkunnleika |

og tímar við serligum tørvi og miðfirraðar tímar.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, ið settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera fyrstalæraranum í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 21. juli kl. 16.00.**

Meiri kann fáast at vita um størvini frá fyrstalæraranum Hans Jákup Andreasen á tlf. 442118 ella 586005.

Eisini ber til at senda teldupost til skúlan.

TVØROYRAR KOMMUNA

# Frítíðarskúlin í Trongisvági søkir leiðara

Frítíðarskúlin í Trongisvági er eitt tilboð til børn í 1.-2. flokki. Í løtuni starvast umframt leiðaran 3 starvsfólk; 1 pedagogur, 1 hjálparfólk og 1 stuðul/hjálparfólk. Arbeiðið er fjølbroytt og fevnir umframt leiðslu um bæði pedagogiskt arbeiði og administrativar uppgávur.

Sum leiðari hevur tú ta dagligu ábyrgdina av stovninum og skalt harafturat samstarva við aðrar fakbólkar innan barnaøkið í relatión til §5 børn í dagstovnalógini.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv við fjølbroyttum avbjóðingum og rúm fyri nýhugsan og møguleika fyri bæði persónligari og fakligari menning.

Søkt verður eftir virkisfúsum persóni við útbúgving sum pedagogur, sum kann arbeiða sjálvstøðugt og kann taka ábyrgd, sum hevur hugflog og er kreativ/ur og sum dámar væl at vera úti.

Starvið er 1 fulltíðarstarv og verður sett eftir sáttmála millum Føroya Peagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á sosialu deild, Susanne Madsen á tlf. 229085.

Umsókn saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera sosialu deild á Tvøroyri í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. juli 2006.

**Tvøroyrar Kommuna**
Sosiala Deild
Postboks 80
FO-800 Tvøroyri

**Mrk. Leiðari til frítíðarskúlan.**

# Summarfrí

Vegna Summarfrí verður skrivstovan stongd frá 13. juli til og við 17. august 2006.

**Sjúkrakassi Skála Læknadømi**
**490 Strendur**
**Tlf. 449 212 - Fax. 449 232**
**sjkhil@post.olivant.fo**

# Summarfrí

Vegna summarfrí verður skrivstovan stongd frá 17. juli til og við 11. august 2006.

**Vága Sjúkrakassi**
360 Sandavágur
Tlf. 333031 · Fax 333145
vaga_sk@post.olivant.fo




# MASKINMAÐUR

Søkt verður eftir royndum maskinmanni at byrja skjótast til ber. Talan er um virkini í skopun og heima á Sandi.

Løn sambært avtalu.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Martin Olsen, virkisleiðari á tel 211 316.

Umsóknir skulu sendast til:

**SANDOY SEAFOOD**
**240 Skopun**
**Att. Andreas F. Hansen**

## Kall sóknast eftir leigubústaði uttan fyri Tórshavn

Fyri eitt av starvsfólkum okkara, ið fer at arbeiða í Tórshavn, sóknast vit eftir húsum ella íbúð at leiga uttan fyri Tórshavn. Í familjuni hjá starvsfólkinum eru tilsamans tvey vaksin og tvey børn. Best er, um innbúgvið er í bústaðnum.

***Vinaliga ringið 50 20 71 / 50 20 72***

kall Tlf 20 20 20